# Barbara í Gongini letur Mads Mikkelsen í

Týska blaðið "Tush" styladi Mads á sama hátt, sum Barbara sjálv stylar sínar modellir.



Mads Mikkelsen í klæðum frá Barbaru í Gongini

**SNIÐGERVING Føroyski sniðgevin Barbara í Gongin er hipp í Berlin. Tí hevur týska blaðið "Tush" valt at lata Mads Mikkelsen í klæðini frá henni til eina stóra myndareportasju.**
**– Tey dáma væl mín androgyna stíl, sigur Barbara**

Inna Tørnroos

*Myndir: Patrizio Di Renzo, Tush*

Mads Mikkelsen er ein tann kendasti danski sjónleikarin í løtuni. Filmurin "Coco Chanel & Igor Stravinsky", har hann hevur høvuðsleiklutin, er at síggja á biografiftinum nú.

Í hesum sambandi gjørdi blaðið "Tush" eina samrøðu við hann.

- Tey vildu gera eitt skemtiportrett av honum og ringdu til mín og spurdu, um eg kundi senda nakrar "klútar" niður, fortelur Barbara í Gongini.

Hon væntaði, at tey kanska fór at nýta okkurt av hennara klædnapløggum, men tá hon fekk blaðið í hendurnar, sá hon, at tey høvdu brúkt alt, sum hon hevði sent, og eisini stylað hann á sama hátt, sum hon stylar sínar modellir.

- Hetta er dreymastoff fyri ein sniðgeva. Mads hevur stórt trúvirði og er ein ekstremt flottur persónur, sigur hon.

Týskarar hava víst stóran áhuga fyri tí androgyna sniðinum hjá Barbaru. Androgynt merkir at tað eru snið, ið bæði menn og kvinnur kunnu nýta.

Handlarnir, sum selja klæðini hjá henni, eru sjálvandi glaðir fyri at fáa ein so kendan persón sum Mads Mikkelsen sum modell.

- Nú skilja fólk betri hvat míni klæði kunnu brúkast til, sigur Barbara.

inna@sosialurin.fo

## Árasølan hjá Frelsunarherinum

Árliga árasølan hjá Heimaforbundinum hjá Frelsunarherinum í Havn verður hósdagin 27. mai.

Tiltakið byrjar kl. 19.00 í salinum hjá Frelsunarherinum við nógvum góðum bundnum lutum, gávukortum og nógvum ymiskum øðrum. Í pausini verður ókeypis kaffi og køkur.

Í sambandi við árasøluna verður tikið ímóti lutum mikudagin 26. mai frá kl.18-20.

Allur peningurin sum kemur inn fer til arbeiðið hjá samkomuni í Havn.

## Siloakórið konsert á hvítusunnu

Annan hvítusunnudag, 24. mai kl. 20, fer sangkórið í Siloa at hava konsert í Fuglafirði. Konsertin verður í samkomuhúsinum, Siloa, ið fyri stuttum er tikið í nýtslu aftur eftir umfatandi nýgerð - ikki minst á tí tøkniliga økinum.

Í Siloakórinum eru einir 25-30 sangarar. Skráin á konsertini er rættiliga fjølbroytt við bæði yngri og eldri tilfari, og meginparturin er rútmiskir sangir. Tey, sum spæla undir, eru Jóhannes Simonsen, klaver, David Simonsen, bass, Elsa Sevdal, gittar, og Rógvi á Lakjuni, trummur.

Á konsertini fer nýstovnað barnakór í Siloa eisini at syngja nakrar sangir. Eydna Jacobsen skipar fyri saman við Eyðun á Lakjuni, sum eisini stjórnar Siloakórinum.

